Hagtíðindi:

Sandoyingar gerast færri

Hagtíðindi er útkomið. Har kunnu vit millum annað lesa, at sandoyingar og suðuroyingar gerast alsamt færri. Meðan tey stóru økini í landinum hava vent fráflytingini hava hesi bæði ikki megnað tað enn

Sveinur Poulsen

Tað vóru nøkur hørð ár í byrjanini av 90-árunum.

Búskapurin fekk eitt skot fyri bógvin, og tann stóra fráflytingin byrjaði.

Tá ið vit vóru flest búðu 47.838 fólk í Føroyum. Tað var í 1989.

So kom fráflytingin, og hon var ógvuslig.

Í tí tíðarskeiðinum lækkaði fólkatalið í øllum økjum, uttan í teimum smærru økjunum í Norðoyggjum, tað sum í hagtølunum verður kallað »Norðoyggjar annars«. Har vaks tað.

Og tað vóru ikki smávegis broytingar sum vístu seg.

Frá 1989 til 1995 lækkaði fólkatalið í Føroyum við 4.535 fólkum úr 47.838 niður í 43.393.

Hetta svarar til eina lækking uppá 9,3 % fyri alt landið.

Tí har fólkatalið minkaði mest var í Sandoynni, har tað fall við heili 14 %. Tað svarar til 247 fólk.

Í Suðuroynni var gongdin ógvuliga lík, tí har minkaði fólkatalið við 762 fólkum ella 13%.

Til samanlíkningar fluttu 956 fólk úr Tórshavnarøkinum, men tað svarar bert til 5,9%, tí fólkatalið var so stórt frammanundan.

Flytingin vendur

Í 1996 byrjaði so at ganga hinvegin.

Í teimum stóru økjunum er fólkatalið vaksið nokkso fitt síðani tá.

Í Tórshavnarøkinum eru 557 íbúgvar fleiri, enn tað vóru í 1995. Tað vil í stuttum siga, at Tórshavnarøkið hevur vunnið helvtina av fráflytingini aftur, eftir bert tveimum árum.

Eysturoyggin kemur beint í hølinum á Havnini. Har er umleið triðingurin av fráflytingini vunnin innaftur.

Men í tveimum økjum av landinum hevur tann skeiva hildið áfram.

Tað er í Sandoyarøkinum og í Suðuroyarøkinum.

Í Sandoynni minkaði fólkatalið við 74 íbúgvum í 96 og 97, meðan tað í Suðuroynni minkaði við 50 fólkum.

Í prosentum svarar tað til eina minking uppá 4,9 % fyri Sandoyarøkið og 1,0 % fyri Suðuroyarøkið.

So har gongur enn tann skeiva vegin.

Negativt burðaravlop

Verður hugt at tølunum fyri 1997 so síggja vit, at ein av orsøkum til hesa skeivu gongd er, at burðaravlopið í báðum økjunum er negativt.

Burðaravlopið er munurin millum talið av føddum og talið av deyðum í einum árið.

Og tað er ikki eitt gott tekin.

Hyggja vit síðani eftir nettoflytingini so síggja vit, at hon í hesum báðum økjum eisini er negativ.

Tað vil siga, at tað flyta fleiri fólk úr økjunum enn til økið.

Og tað, at fleiri fólk flyta úr einum økið, kann verða ein av orsøkunum til, at burðaravlopið fellur, ella í ringasta føri verður negativt.

Orsøkin til tað er einføld.

Tað er serliga tað yngra ættarliðið, m. a. kvinnur í burðardyggum aldri sum flyta, meðan tær eldru, sum hava gjørt sína burðarskyldu, sum verða verandi.

Arbeiðsloysi orsøkin

Fara vit at leita eftir orsøkini til at tey ungu flyta úr økjum, sum Sandoynni og Suðuroynni, so mugu vit hyggja eftir hvussu arbeiðsmøguleikarnir eru í økjunum.

Og her kemst ikki uttan um, at arbeiðsloysi í Sandoynni og í Suðuroynni, hevur verið ógvuliga høgt seinastu árini.

Í november 1995 var arbeiðsloysi í Sandoynni 16%. Hetta svarar til, at 146 sandoyingar onki lønandi arbeiði høvdu at takast við.

Fyri Suðuroynna er hetta tal eitt sindur ørvísi, tí Suðuroyggin í arbeiðshagtølunum verður uppgjørd í tveimum. Arbeiðsloysistølini eru høg, men vísa ein týðiligan mun á sunnaru og norðaru helvt

Í sunnaru helvt av Suðuroy gingu 18% uttan arbeiðið, meðan 9% onki arbeiðið høvdu í Suðuroyar norðaru helvt.

Og hetta er áhugavert, tí miðaltalið fyri alt landið var 10 % í november 95.

Arbeiðsloysið er fallandi og tølini síggja munandi betri út í dag, enn tey gjørdu fyri tveimum árum síðani, serliga fyri sandoyingar.

Fyri Suðuroynna sunnaru helvt, sær tað enn rættuliga svart út. Tí meðan arbeiðsloysið fyri alt landið er fallið úr 10% í november 1995 til 5% í november 1997, so er tað í Suðuroyar sunnaru helvt ikki fallið eins skjótt.

Har hava tey eitt arbeiðsloysi, sum er tvífalt av miðaltalinum fyri alt landið, nevniliga 10%.

Hinvegin er arbeiðsloysið í Sandoynni fallið ógvuliga skjótt síðani 1995. Í november 1997 høvdu 20 sandoyningar onki arbeiðið, og tað svarar til eitt arbeiðsloysið uppá 2%.

Tá vit hugsað um, at talið í 1995 var 16%, so er hetta eitt ógvusligt fall, men tað eru sandoyingar óiva glaðir fyri.

Tí, eitt øki uttan arbeiðsmøguleikar hevur ilt við at halda fast við tað unga ættarliðið. Og tað er ein ónd ringrás at koma inn í.

Orsøkin til at burðaravlopið fellur er m. a., at tað unga fólkið flytir av smáplássunum, tí at arbeiðsloysi er ov stórt. Og ein av orsøkunum til at arbeiðsloysið fellur, er eisini at fólk flyta úr økinum.

Aktiviteturin hjá Fiskavirking

Hvør er so orsøkin til tað stóra arbeiðsloysið í hesum báðum økjunum?

Í Sandoynni vóru tvey flakavirkir, sum bæði vórðu løgd lamin í sambandi við, at Fiskavirking varð sett á stovn.

Hetta var største orsøkin til at arbeiðsloysi í Sandoynni fór heilt uppá 16%.

Í september mánað í fjør fór Sandoy Seafood undir virksemi sítt, bæði í Skopun og á Sandi, og tað sæst týðiliga í arbeiðshagtølunum. Arbeiðsloysið fall við 3% í oktober og november mánað í 1997, úr 5% niður í 2%.

So nú kann kanska hugsast, at fólkatalið í Sandoynni aftur fer at økjast spakuliga.

Útlitini fyri tí eru í øllum førum vorðin frægari, um enn tey ikki eru vorðin heilt góð enn.

Í Suðuroyar sunnaru helvt hevur gongdin harafturímóti ikki verði tann sama.

Flakavirkið, sum átti lívið í mongum í mongum vágbingi áðrenn tað mátti lata aftur, er ikki latið uppaftur, og enn røkist onki fyri at tað letur upp aftur í bræði.

Í norðaru helvt av Suðuroy er eisini arbeiðsloysi. Har ganga 5% av fólkinum uttan arbeiðið. Men tað samsvarar við miðaltalið fyri alt landið

Niðurstøðan av hagtølunum má verða, at tað enn gongur tann skeiva vegin fyri tey smærru økini.

Haðani flyta fólk, meðan tey savnast í miðstaðarøkinum.

Men samstundis er tað væl skiljandi, um tað er einasti møguleiki fólk hava fyri at útvega sær arbeiði ella útbúgving.

Fólkatalið í kommunum og landspørtum, 31.12.1989 – 31.12.1997

Landspartur/ Kommuna	31.12. 1989	31.12. 1990	31.12. 1995	31.12. 1996	31.12. 1997	Broyting í tali 89–95	Broyting í tali 95–97	Broyting í % 89–95	Broyting í % 95–97
Klaksvíkarøkið	**5484**	**5444**	**4946**	**4935**	**4946**	**-538**	**0**	**-9,8**	**0,0**
Hvannasunds k.	493	489	446	433	431	-47	-15	-9,5	-3,4
Klaksvíkar	4991	4955	4500	4502	4515	-491	15	-9,8	0,3
Norðoyar annars	**673**	**664**	**686**	**678**	**679**	**13**	**-7**	**1,9**	**-1,0**
Fugloyar	61	53	52	45	44	-9	-8	-14,8	-15,4
Svínoyar	57	58	64	63	64	7	0	12,3	0,0
Viðareiðis	309	303	308	310	297	-1	-11	-0,3	-3,6
Kunoyar	116	115	126	129	129	10	3	8,6	2,4
Mikladals	80	82	82	78	80	2	-2	2,5	-2,4
Húsa	50	53	54	53	65	4	11	8,0	20,4
Norðara Eysturoy	**1680**	**1659**	**1469**	**1513**	**1539**	**-211**	**70**	**-12,6**	**4,8**
Eiðis	717	721	627	654	673	-90	46	-12,6	7,3
Sunda	475	475	425	438	445	-50	20	-10,5	4,7
Funnings	106	113	106	102	98	0	-8	0,0	-7,5
Gjáar	66	62	65	65	63	-1	-2	-1,5	-3,1
Oyndarfjarðar	184	180	163	168	165	-21	2	-11,4	1,2
Eiðisvíkar	132	108	83	86	95	-49	12	-37,1	14,5
Syðra Eysturoy	**8863**	**8782**	**7895**	**8095**	**8210**	**-968**	**315**	**-10,9**	**4,0**
Fuglafjarðar	1865	1837	1419	1426	1467	-246	48	-14,8	3,4
Leirvíkar	862	835	741	776	808	-121	67	-14,0	9,0
Geita	971	955	871	897	902	-100	31	-10,3	3,6
Nes	1152	1153	1028	1072	1065	-124	37	-10,8	3,6
Runavíkar	2490	2480	2267	2338	2364	-223	97	-9,0	4,3
Sjóar	1006	1007	951	963	980	-55	29	-5,5	3,0
Skála	717	715	618	623	624	-99	6	-13,8	1,0
Tórshavnarøkið	**16232**	**16182**	**15276**	**15560**	**15833**	**-956**	**557**	**-5,9**	**3,6**
Argja	1489	1511	1495	1509	1567	6	72	0,4	4,8
Tórshavnar	14743	14671	13781	14051	14266	-962	485	-6,5	3,5
Streymoy annars	**4345**	**4244**	**3913**	**3899**	**3983**	**-432**	**70**	**-9,9**	**1,8**
Haldarsvíkar	306	301	279	264	268	-27	-11	-8,8	-3,9
Saltsunar	27	26	32	30	30	5	-2	18,5	-6,3
Hvalvíkar	370	358	305	311	327	-65	16	-17,6	5,2
Hósvíkar	268	254	225	220	245	-43	20	-16,0	8,9
Kollafjarðar	930	920	894	897	906	-36	12	-3,9	1,3
Kvívíkar	593	577	571	553	567	-22	-4	-3,7	-0,7
Vestmanna	1292	1262	1143	1144	1150	-149	7	-11,5	0,6
Kirkjubøar	192	186	178	190	197	-14	19	-7,3	10,7
Hestis	61	57	43	49	53	-18	10	-29,5	23,3
Nólsoyar	306	303	243	241	246	-63	3	-20,6	1,2
Vágaøkið	**2946**	**2884**	**2602**	**2593**	**2617**	**-344**	**15**	**-11,7**	**0,6**
Sandavágs	758	734	666	662	673	-89	4	-11,7	0,6
Miðvágs	1087	1063	958	958	974	-129	16	-11,9	1,7
Sørvágs	1003	984	888	894	896	-115	10	-11,5	1,1
Biggjar	74	75	69	63	54	-5	-15	-6,8	-21,7
Mykines	24	28	18	16	18	-6	0	-25,0	0,0
Sandoyarøkið	**1760**	**1743**	**1513**	**1471**	**1439**	**-247**	**-74**	**-14,0**	**-4,9**
Sands	648	644	550	541	529	-98	-21	-15,1	-3,8
Skopunar	602	591	523	508	504	-79	-19	-13,1	-3,6
Skálavíkar	229	227	181	172	162	-48	-19	-21,0	-10,5
Húsavíkar	189	189	168	160	154	-21	-14	-11,1	-8,3
Skúvoyar	92	92	91	90	90	-1	-1	-1,1	-1,1
Suðuroy	**5855**	**5815**	**5093**	**5046**	**5043**	**-762**	**-50**	**-13,0**	**-1,0**
Hvalbiar	836	850	774	774	784	-62	10	-7,4	1,3
Tvøroyrar	2122	2093	1831	1822	1790	-291	-41	-13,7	-2,2
Fámjins	127	120	119	119	130	-8	11	-6,3	9,2
Hovs	165	168	136	131	130	-29	-6	-17,6	4,4
Porkeris	395	408	387	371	366	-8	-21	-2,0	-5,4
Vágs	1691	1665	1411	1395	1400	-280	-11	-16,6	-0,8
Sumbiar	519	511	435	434	444	-84	9	-16,2	2,1
Tilsamans	47838	47417	43393	43790	44290	-4445	897	-9,3	2,1
Íroknað rættingar	47838	47417	43393	43793	44290	-4445	897	-9,3	2,1

Kelda: Landsfólkayvirlitið/Elektron, uppgerð frá 2.2.1998

Arbeiðsloysi, tøk, býtt eftir landspørtum og kyni, nov. 1995 – nov. 1997

Fólk í tali, ið eru skrásett sum tøkir persónar hjá ALS. T.e. oll tey sum eru skrásett í arbeiðsloysis-skipanini. Tey sum eru í skoytisskipanini fyri fiskavirki eru ikki íroknað. Heldur ikki tey, sum eru uttan fyri ALS ti tey eru tann ella onnur avmarkaðu tíð, tey hava rætt at standa í ALS.

Aldur		Fólkatal 16–66 ár tann 31.12.96	nov95	nov96	des	jan97	feb	mar	apr	mai	jun	jul	aug	sep	okt	nov97
Suðuroy sunnara	Kv.	649	149	80	83	85	91	92	89	83	81	74	74	75	82	78
	Me.	781	114	63	68	80	83	74	73	66	61	59	59	59	60	62
	Tils	1430	263	143	150	164	171	166	161	149	142	133	133	134	142	140
Suðuroy norðara	Kv.	780	89	59	56	64	74	74	72	69	67	63	64	61	57	54
	Me.	927	63	39	43	59	74	65	65	56	56	62	65	54	40	40
	Tils	1707	152	97	99	123	148	139	136	125	123	124	129	115	97	94
Sandoy	Kv.	402	90	44	46	45	39	36	34	27	26	25	27	24	18	11
	Me.	475	56	29	29	31	29	28	25	25	22	20	17	17	16	9
	Tils	877	146	74	75	76	68	64	58	52	48	45	44	41	34	20
Til-samans	Kv.	12790	1477	955	978	1021	1032	1027	1013	963	891	876	884	854	864	844
	Me.	14635	1245	635	649	721	803	784	742	624	505	453	457	438	422	426
	Tils	27425	2721	1591	1627	1742	1835	1811	1755	1587	1396	1329	1341	1292	1286	1270

Arbeiðsleys (tøk) í % av fólkatalinum í landspørtunum

	nov95	nov96	des	jan97	feb	mar	apr	mai	jun	jul	aug	sep	okt	nov97
Suðurstreymoy	8	5	5	5	5	5	5	4	3	3	4	3	3	3
Norðstreymoy	9	6	6	7	7	6	7	6	5	4	5	4	5	5
Eysturoy	12	7	7	7	8	8	8	7	6	6	6	6	6	6
Norðoyar	10	5	5	5	6	6	6	6	5	4	4	4	4	4
Vágar	8	6	7	7	7	8	7	6	5	5	5	5	5	5
Suðuroy sunn.	18	10	10	11	12	12	11	10	10	9	9	9	10	10
Suðuroy norð.	9	6	6	7	9	8	8	7	7	7	8	7	6	5
Sandoy	16	8	8	9	8	7	7	6	5	5	5	5	4	2
Tilsamans	10	6	6	6	7	7	6	6	5	5	5	5	5	5

Kut úr talvu um arbeiðsloysi, býtt eftir landspørtum. Kelda: Hagtíðindi, nr. 4 í 1997